

www.oljan.fo

Jan Müller 28 - 07 - 2012

Nýggj rannsóknarferð kann gera Norðpólin danskan

Danmark ger nú eina roynd at tryggja sær eina betri støðu, tá spurningurin um rættindi og ræði í økinum kring Norðpólin skal avgerast. Týsdagin fara 17 danskir granskarar til Svalbard, og haðani skulu teir á eina rannsóknarferð norður til pólin. Málið við ferðini er at savna vísindaligt prótvilfar fyri, at eitt 150.000 ferkilometrar stórt øki av havbotninum við Norðpólin er ein partur av tí grønlendska landgrunsstøðinum og tí eisini ein partur av tí danska ríkinum. Norðpólurin sjálvur er í tí økinum, sum danir halda seg hava rætt til. Tað eru ikki bara danir, sum kanna sær Norðpólin og øki við pólin. Russiskir granskarar eru í ferð við tilsvarandi rannsóknir, og longu í september í 2007 setti ein russiskur kavbátur eitt russiskt flagg á botnin við Norðpólin. Tað danska rannsóknarliðið fer frá Svalbard við ísbrótaranum Oden. Hann skal fyrst gera eina 25 fjórðingar langa rennu, og hon skal gerast so mikið breið, at granskararnir kunnu gera seismiskar kanningar av botninum. Dýpið har er millum tríggjar og fýra kilometrar, og hetta er tann fyrsta royndin nakrantíð at kortleggja undirsjóvarfjallarøðina Lomonosov, sum røkkur líka úr Grønlandi til Sibiria. Til ST í 2014 Verður kanningarúrslitið tað, sum danir vóna, fara danska stjórnin og grønlendska landsstýrið at lata ST eitt krav um rættin til havbotnin og alt tað, sum kann vera undir honum. Hetta skal ætlandi gerast í 2014, sigur danska kringvarpið. Umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace er ikki serliga fegin um, at lond eru farin at kanna sær rættin til økið undir og kring Norðpólin. Í einum átaki við heitinum "Save-the-Arctic" roynir felagsskapurin at fáa undirtøku fyri at friða tann partin av Arktis, sum ikki hoyrir til nakað ávíst land. Gongst sum ætlað, koma teir donsku granskararnir aftur til Svalbard tann 14. september.